# Vikarur

**til Hvalbiar Skúla**

Søkt verður eftir vikari til Hvalbiar skúla skúlaárið 2002/2003. Starvið er fyri lærara í farloyvi, og er eitt fulltíðarstarv.

Starvið verður lønt sambart avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Umsóknir skulu verða Hvalbiar skúlastýri í hendi í seinasta lagi 3. juni 2002.

Umsóknir skulu stílast til:

**Hvalbiar Skúlastýrið**
Att.: Róin Schrøter, formaður
850 Hvalba

# Lýsing

Søkt verður eftir einum trolbassa og einum netamanni til rækjuveiðu við norska trolaranum Sævik-ing í Barentshavinum, til mynstringar 21. mai.

Áhugaði kunnu venda sær til telefon:

**4790051725 í Noreg**
**ella**
**213406 í Føroyum**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2697, P/F Telefonverkið, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 18.04.2002.
Nýggj hjánøvn: Telekeyp (P/F Telefonverkið), Televarpið (P/F Telefonverkið), Sn@rnet (P/F Telefonverkið), S@mnet (P/F Telefonverkið), Boðtænastan (P/F Telefonverkið), Gluggin (P/F Telefonverkið), Valhøll (P/F Telefonverkið), Kurl@ (P/F Telefonverkið), Kurla.fo (P/F Telefonverkið), adsl.fo (P/F Telefonverkið), alnet.fo (P/F Telefonverkið), csirt.fo (P/F Telefonverkið), isdn.fo (P/F Telefonverkið), e-mail.fo (P/F Telefonverkið), e-post.fo (P/F Telefonverkið), email.fo (P/F Telefonverkið), epost.fo (P/F Telefonverkið), faroese-tele.com (P/F Telefonverkið), ft-umval.fo (P/F Telefonverkið), ft.fo (P/F Telefonverkið), gsm.fo (P/F Telefonverkið), gulu.fo (P/F Telefonverkið), inet.fo (P/F Telefonverkið), internet.fo (P/F Telefonverkið), irc.fo (P/F Telefonverkið), mail.fo (P/F Telefonverkið), net.fo (P/F Telefonverkið), nummar.fo (P/F Telefonverkið), portal.fo (P/F Telefonverkið), snarnet.fo (P/F Telefonverkið), sportal.fo (P/F Telefonverkið), tele.fo (P/F Telefonverkið), tfl.fo (P/F Telefonverkið), wap.fo (P/F Telefonverkið), web.fo (P/F Telefonverkið), olivant.fo (P/F Telefonverkið).
Nevnd:
Farin úr nevndini: Jógvan Elias Ellefsen, Onnugøta 20, 188 Hoyvík (formaður) og Bergtór Halldórsson, Lækjarhvammur 7, ÍS- 220 Hafnarfjørður, Annika Johansen, Marinargøta 8, 188 Hoyvík (Starvsfólkavald) og Anna Elisabeth Ejdesgaard, 470 Eiði (tiltakslimur).
Innkomin í nevndina: Hákun Steingrímsson, Mikkjalstrøð 5, 100 Tórshavn (formaður), Tage M. Iversen, Bregnerødvej 19, DK- 3460 Birkerød, Bjørg Joensen, Undir Glaðsheyggi 16, 100 Tórshavn (starvsfólkavald), Jákup Nielsen, Mýrisnípuvegur 44, 100 Tórshavn (tiltakslimur) og Ulla Stenberg, Argjavegur 7, 160 Argir (tiltakslimur).

Skráseting Føroya tann 15. mai 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3360
Navn: Sp/f Fjølvinna
Hjánavn: Fjølmiðla- og PR-Ráðgevingin (Sp/f Fjølvinna)
Adressa: Skrivaragøta 3, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 14.05.2002
Viðtøkudato: 14.05.2002
Kapitalur: Kr. 85.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 45.000,00 til kurs 100 og kr. 40.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Kári Durhuus, Skrivaragøta 3, 100 Tórshavn.
Stjórn: Kári Durhuus, Skrivaragøta 3, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 14.05.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og tænastu, bæði innan fjølmiðla- og handverksvinnu umframt fasta ogn og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 15. mai 2002

Kristin Balle

# Aðalskrivari í Føroya Ungdómsráð

Leitar tú eftir avbjóðingum og einum spennandi starvi, so kann hetta vera júst starvið, tú leitar eftir. Føroya Ungdómsráð, sum er felagsskapur fyri skipaðu barna- og ungdómsfelagsskapirnar í Føroyum, søkir eftir aðalskrivara fulla arbeiðstíð.

**Í starvinum skalt tú:**

- Røkja dagliga virksemi felagsins
- Samskifta við øll viðkomandi
- Gera vanligar skrivstovuuppgávur
- Virka sum skrivari
- Samskipa tiltøk í Føroyum og í Norðurlondum
- Halda heimasíðuna við líka og senda tíðindaskriv út, tá tørvur er á tí

**Vit vænta at tú:**

- Hevur royndir innan barna og/ella ungdómsarbeiði
- Ert røkin og fyrikomandi
- Ert dugnalig/ur at samskifta og samskipa
- Dugir væl at skriva føroyskt
- Dugir at tosa og skriva á norðurlendskum
- Fyrimunur er, um tú eisini tosar og skrivar enskt.
- Dugir at nýta teldu á brúkarastigi.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og eisini skalt tú verða sinnað/ur at fara av landinum í arbeiðsørindum.
Tú kanst fáa meira at vita um starvið við at venda tær til Andreu Eldevig á tlf 218108.

*Umsóknir saman við møguligum viðmælum og prógvum, skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 27. mai 2002.*

**Føroya Ungdómsráð**
**Tinghúsvegur 18, 4h.**
**110 Tórshavn**

Lesið Sosialin

Haldarar hjá Dimmalætting og Sosialinum,
sum ikki fáa leygardagsbløðini, verða biðin um at ringja tlf. 253497 leygardag millum kl. 11 og 14
Prentmiðstøðin

# Til øll læruplàss

Gjørt verður vart við, at yrkisútbúgvingarlógin er broytt, og verður í tí sambandi gjørt vart við,

– at endurrindanin av lærlingalønini undir skúlagongd lærlinganna kann í mesta lagi vera ásetta minstalønin sambært sáttmála *millum avvarðandi yrkisfeløg*, og

– at uppgerðir av lønarendurgjøldum og eisini ferðagjøldum (tá lærlingar taka skúlagongdina uttanlands) skulu verða Mentamálastýrinum í hendi *í seinasta lagi 8 vikur eftir hvørt skúlaskeið.*

Minnist tí til at lata uppgerðirnar inn í góðari tíð.

**Yrkisdepilin**
Hoyvíksvegur 72
Telefon 355050
t-postur: depilin@yrkisdepilin.fo
Heimasíða: www.yrkisdepilin.fo

# Avloysarar

Í summar hava vit brúk fyri stýrimonnum, maskinmonnum og dekkarum, at avloysa okkara føstu manningar.

Til størvini krevjast viðkomandi vinnubrøv, heilsuváttan og trygdarskeið.

Løn-, arbeiðs- og setanartreytir sambært sáttmálum millum Fíggjarmálastýrið og ávikavist Skiparaog Navigatørfelagið, Maskinmeistarafelagið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir við prógvum og viðmælum skulu sendast til Fiskiveiðieftirlitið, postboks 347, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 22. mai 2002.

**Fiskiveiðieftirlitið**



# Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna frá 1. september 2002.

Barnagarðurin er ein sjálvsognarstovnur normeraður til 30 børn, í aldrinum 3–7 ár, býtt sundur í 2 stovur.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Lønarstig 9.

Meira fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðarin, tlf. 332948.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi seinast 15. juni 2002.

**Barnagarðurin »Sýslan«**
FO-380 Sørvágur

# Skúlin við Ósánna

Søkt verður eftir lærarum skúlaárið 2002/2003.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2002/2003, verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

**Skúlin við Ósánna**
2 størv fyri lærarar í farloyvi við 26,5 t/v
1 starv við 19 t/v

**Serskúladeildin**
2 størv fyri lærarar í farloyvi við 26,5 t/v
1 starv við 20 t/v
1 starv við 15 t/v vegna serligar umstøður

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlastjóran tlf. 218373 – 456073.

Umsóknir til starvið skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 31. mai 2002.

**Skúlastýrið fyri Ósáskúlan**
v/ Óluva Klettskarð
Stoksoyravegur 7
700 Klaksvík

# Fuglafjarðar skúli

Søkt verður eftir 5 lærarum í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2002/2003.
Størvini eru til fulla tímatalvu.

Størvini eru fyri 2 lærarar í farloyvi, 2 lærarar v. ráðgeving og lærarar við lækkaðum tímatali.

Størvini verða lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið

Møguligar umsóknir skulu latast skúlastýrinum í seinasta lagi mikudagin 29. mai kl. 12.00

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum!

**Skúlastýrið f. Fuglafjarðar skúla**
**Uni Næs, formaður**
**530 Fuglafjørður**

BESTA MÁLINGIN TIL HÚSIÐ
máling & gólv
JOHNSTONE'S TRÆVERJA
SERA HALDGÓÐ
Tolir væl okkara harðføra veðurlag
5 l. 399 kr.
STORMSHIELD BETON MÁLING
Royndir vísa hon heldur í 15 ár
10 l. 549 kr.
máling & gólv
við Landavegin
Tlf. 316066




www.sosialurin.fo

# Varaleiðari

Umlættingarheimið Dáin í Klaksvík søkir eftir varaleiðara við pedagogútbúgving 40 tímar um vikuna, arbeiðstíðin er skiftandi vaktir, dag, kvøld, nátt og vikuskiftisvaktir.

Starvið er eitt farloyvisstarv frá 1.7.02 til 1.6.03

Løn og setunarviðurskifti sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Starvsbyrjan 1.7.02 ella eftir nærri avtalu.

Dáin hevur eina dagumlætting til børn og eina døgnumlætting til 5 børn og vaksin.

Nærri fæst at vita, við at ringja tlf. 457185 ella 217185 millum kl. 10 og 11 og tosa við Joan Midjord.

Umsøkn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal verða Dáanum í hendi seinasta lagi 04.06.02 og sendast til

**Umlættingarheimið Dáin**
Mýrivegur 11
700 Klaksvík

# Húsa/Syðradals skúli

Søkt verður eftir lærara í tíðaravmarkað starv (umleið 17 tímar) skúlaárið 2002/2003.

Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 04. juni 2002.

**Skúlastýrið fyri Húsa/Syðradals skúla**
v/ Elin Syderbø
796 Húsar

# Føroya Fornminnissavn

Framsýningarnar í Brekkutúni 6 í Hoyvík og útisavnið Heima á Garði lata upp 2. hvítusunnudag kl. 14 og hava opið hesar tíðir fram til 15. september:

Mánadag til fríggjadag klokkan 10 til 17
Leygardag og sunnudag klokkan 14 til 17

**Føroya Fornminnissavn**